# Hvat skal eg fara í









## Kjólin:

Tey flestu munnu gleða seg til jólaborðhaldini, sum nú eru í hondum. Tað er gott at sleppa at hugna sær við vinfólki og arbeiðsfeløgum, men afturvendandi og átroðkandi spurningurin hjá flestu konufólkum er: hvat skal eg fara í…

Pengarnir røkka helst ikki til at keypa eitt heilt nýtt sett av klæðum, og skalt tú til fleiri borðhald, kann tað skjótt gerast ein dýr søga, um tú skalt hava ein nýggjan kjóla til hvørt borðhaldið. Hinvegin heldur tú kanska, at tað er ov keðiligt at fara í tað sama fleiri kvøld –og enntá kanska tað sama, sum tú vart í til jólaborðhaldini í fjør.

Okkara ráð eru tó, at um tú eigur ein "lítlan svartan", kanst tú saktans finna tær hann framaftur í ár –og nýta hann til øll borðhaldini, um tú skalt til fleiri.

Eigur tú ongan, eru ráðini at ogna tær ein, tí ein svartur kjóli eigur at vera partur av einum og hvørjum skápi. Fyrimunurin við honum er, at hann kann nýtast umaftur og umaftur í áravís. Tað einasta, tær tørvar, er at skifta tilhoyri út.

*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*






## Smúkkurnar:


*Louis Vuitton leggur fokus á stórar diamantkendar steinar, ið nærum fjala bæði háls og herðar heilt.*

Smúkkurnar skulu nú vera so stórar og sjónligar, sum gjørligt. Tað, vit síggja á alheims mótapallum júst nú, eru stórar træperlur, stór hálsprýði og smúkkur, ið eru yvirvaksnar.

Tað ber eisini til at gera sum Givenchy, og heingja rúgvuvís av klønum ketum um hálsin ella armin í senn.

Tað stutta av tí langa er, at tú kanst pynta teg í hippie stíli við stórum træperlum og blómum, í gotiskum stíli við krossum og øðrum súmbolum ella primadonnustíli við diamantum.

Alt er loyvt, so leingi tilhoyrið sæst væl og veruliga tekur fokus.


*MARNI hevur eisini tikið ovurstóra smúkkumótan við og sýnir her armprýði í hippiestíli við stórum blómum*

*Her er Madonna farin í nýggjasta trendin frá Givenchy, við tíggjutals ketum um hálsin*



## Frakkin:


*Gant heldur á við armykenda stílinum. Myrkur jakki úr ull og við gullknappum*